## Flindt vann aftur

Tað eydnaðist aftur Odd Grenland at vinna í norsku tippuliguni í gjár. Hetta var annar sigurin á rað hjá botnliðnum, og undan seinasta umfari hevur Odd Grenland framvegis møguleikan at yvirliva í deildini. Fyrrverandi KÍ-venjarin Ove Flindt-Bjerg hevur havt ábyrgdina av liðnum seinastu dystirnar, og nú ein dystur er eftir at spæla er Odd Grenland tvey stig frá bjargingini. Í seinasta umfarinum skal Odd Grenland vinna ímóti Frederikstad, meðan Start skal tapa.



## Alonso breyt fótin

Spaniólin Xabi Alonso er júst komin fyri seg eftir skaða, men í dystinum ímóti Arsenal í gjár gekk aftur galið hjá honum. Alonso fekk ein so dyggan stoyt í fótin, at hann breyt eitt av smá beinunum í fótinum. Harvið má Alonso aftur halda ein longri steðg frá fótbóltinum. Álopsstjørnan Fernando Torres fekk eisini ein vøddaskaða og má eisini halda steðg. Dysturin millum Arsenal og Liverpool endaði 1-1.

# Ársins fyrsta brak




*Steven Gerrard hátíðarhelt sín dyst nummar 400 fyri Liverpool við at senda fríspark beinleiðis í netið*

*Mynd: Polfoto/AP*

**Dysturin í Onglandi sunnudagin kl. 16 varð áðrenn dystarbyrjan, skírdur at vera ársins fyrsta brak. Úrslitið gjørdist javnleikur 1-1, hóast Arsenal tvær ferðir truffu stongina. –Vit eru sera óhepnir, ikki at vinna í dag, segði ein vónbortin Cesc Fabregas**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Sunnudagin spældu Liverpool og Arsenal ein sera spennandi og vælleiktan dyst á Anfield í Liverpool. Ensku miðlarnar høvdu hug at kalla dystin fyri ársins fyrsta orduliga brak. Og eitt brak varð tað sanniliga.

Liverpool byrjaðu sera væl og komu á odda eftir bert sjey minuttum, tá Steven Gerrard - ið spældi sín dyst nummar 400 fyri Liverpool - hevði skotið enn eitt fríspark beinleiðis í mál, uttan møguleika hjá málverjanum at bjarga.

Men 10 minuttir fyri leiklok eydnaðist tað unga spaniumanninum Cesc Fabregas at javna til endaliga úrslitið 1-1.

Liverpool, ið høvdu bæði Xabi Alonso og Fernando Torres við aftur, eftir skaða, fingu júst hesar báðar skaddar enn eina ferð. Í báðum førum var talan um, at skaðin var komin í sama stað. Hetta fer óivað at seta síni spor, tí hesir verða roknaðir fyri at vera stuðulsleikarar á liðnum.

### Kempurnar vakna

Hinir dystirnar sunnudagin vóru annars fýra í tali, meðan seks dystir vórðu spældir leygardagin.

Leygardagin er vert at nevna at Manchester United á heimavølli knústu Middlesbrough 4-1, og at Chelsea, somuleiðis bombarderaðu Manchester City, við seks málum móti ongum.

### Venjaraskifti

Bæði Tottenham og Bolton hava fingið serstakliga slaka byrjan á kappingarárið, og hava tey í feløgunum báðum, tikið avgerðina um at koyra sín manager úr starvi. Gary Megson skal taka við róðurið í Bolton, meðan Juande Ramos skal standa við stýrisvøðlin í Tottenham. Um hetta fer at broyta nakað uppá laku úrtøkuna, fer t´ðin at visa. Tað bleiv í øllum førum til 2-1 tap hjá Tottenham, og hjá Bolton varð talan um javnleik 1-1.

### Næsta umfar

Næsta umfar bjóðar uppá eitt satt oddabrak, tí tá bresta Arsenal og Man. Utd saman á nýggja Emirates leikvøllinum í London. Arsenal eru í løtuni á odda í Premier League við 26 stigum, frammanfyri júst Man. Utd, men munurin er bert í skotnum málum. Annars hevur Arsenal spælt 10 dystir, meðan United hava spælt 11.

### Úrslitini um vikuskiftið

| | | |
|---|---|---|
| Birmingham-Wigan | 3-2 | (Kapo 2,Ridgewell - M.Bent2) |
| Bolton-Aston Villa | 1-1 | (Anelka - Moore) |
| Chelsea-Man. City | 6-0 | (Essien, Drogba 2, J.Cole, Kalou, Shevchenko) |
| Derby-Everton | 0-2 | (Arteta, Yakubu) |
| Liverpool-Arsenal | 1-1 | (Gerrard - Fabregas) |
| Man. Utd-Middlesbrough | 4-1 | (Nani, Rooney, Tevez 2 - Aliadiéré) |
| Portsmouth-West Ham | 0-0 | (Ongi mál) |
| Reading-Newcastle | 2-1 | (Kitson, Long - Duberry (s.m.) |
| Sunderland-Fulham | 1-1 | (Jones - Davies) |
| Tottenham-Blackburn | 1-2 | (Keane - McCarthy, Samba) |

**Enska Premier League**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Arsenal | 10 | 8 | - | 2 | - | 0 | 22 | 7 | 15 | 26 |
| 2 | Man Utd. | 11 | 8 | - | 2 | - | 1 | 19 | 4 | 15 | 26 |
| 3 | Man City | 11 | 7 | - | 1 | - | 3 | 15 | 13 | 2 | 22 |
| 4 | Chelsea | 11 | 6 | - | 3 | - | 2 | 16 | 8 | 8 | 21 |
| 5 | Blackburn | 10 | 6 | - | 3 | - | 1 | 15 | 9 | 6 | 21 |
| 6 | Liverpool | 10 | 5 | - | 5 | - | 0 | 17 | 6 | 11 | 20 |
| 7 | Portsmouth | 11 | 5 | - | 4 | - | 2 | 19 | 12 | 7 | 19 |
| 8 | Newcastle | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 17 | 13 | 4 | 17 |
| 9 | Everton | 11 | 5 | - | 1 | - | 5 | 15 | 13 | 2 | 16 |
| 10 | Aston Villa | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 14 | 13 | 1 | 15 |
| 11 | West Ham | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 12 | 9 | 3 | 14 |
| 12 | Reading | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 14 | 23 | -9 | 13 |
| 13 | Birmingham | 11 | 3 | - | 2 | - | 6 | 11 | 15 | -4 | 11 |
| 14 | Fulham | 11 | 1 | - | 6 | - | 4 | 13 | 17 | -4 | 9 |
| 15 | Sunderland | 11 | 2 | - | 3 | - | 6 | 12 | 20 | -8 | 9 |
| 16 | Wigan | 11 | 2 | - | 2 | - | 7 | 10 | 17 | -7 | 8 |
| 17 | Middlesbr. | 11 | 2 | - | 2 | - | 7 | 11 | 22 | -11 | 8 |
| 18 | Tottenham | 11 | 1 | - | 4 | - | 6 | 18 | 23 | -5 | 7 |
| 19 | Bolton | 11 | 1 | - | 3 | - | 7 | 10 | 17 | -7 | 6 |
| 20 | Derby | 11 | 1 | - | 3 | - | 7 | 5 | 24 | -19 | 6 |